# Formansstríðið í FF

MORTAN BERJASTEIN

Óli Jacobsen byrjaði stríðið við at leggja Dan undir at hava sagt seg verða í lummanum hjá reiðarunum - í tí tíðinadskrivi, sum kom í bløðini í samband við fráboðanina um, at Dan stillaði upp móti Óla.

Í tíðindaskrivinum stóð at »Dan hevur eisini tann fyrimun, at hann ikki er heftur at nøkrum reiðara« og fyri tað næsta var tað ikki Dan, ið hevði skrivað tíðindaskrivið, men undirritaði. At Óli so tulkar tað sum hann ger, er neyvan av tí at hann ikki er í lummanum hjá nøkrum reiðarum.

Fyri nøkrum árum síðani kom ein manning til skipið fyri at fara til fiskiskap, men tá hevði reiðarin biðið annað fólk, tí skipið skuldi í oljuvinnuna sum vaktarskip. Hetta hevði so við sær, at manningin sum tá var uppsøgd frá einum degi til annan átti minstuløn - í so og so langa tíð, alt eftir hvat starv hann hevði umborð - frá reiðarinum. Óli bleiv gjørdur varugur við málið, og vildi hann hava ein fund við reiðaran saman við manningini og sókanrstýrislimunum sum umboðaðu hesa somu manning. Fundurin bleiv í barnaheiminum hjá Óla, í Norðragøtu.

Spenningurin var sum so ikki stórur - tí sáttmálin segði púra greitt, hvat manningin átti - talan skuldi bert verið um ein avgreiðsluspurning, men so var ikki.

Óli byrjaði fundin við at spyrja manningina, um teir ikki kundu vera nøgdir, um teir fingu helvtina av tí teir áttu, tí reiðarin var ikki so væl fyri fíggjarliga.

Hvør segði seg ikki verða í lummanum hjá nøkrum reiðara??

# Hvat er politikkur á kristiligum mentanarstøði?



JOHN WILLIAM JOENSEN
formaður. Vegna nevndina í Norðoya Sambandsfelag

**Nevndin í Norðoya Sambandsfelag hevur á fundi tann 17. desember 2006 viðgjørt støðuna sum íkom eftir at størsti parturin av sambandstinglimunum atkvøddu fyri uppskotinum hjá Tjóðveldisflokkinum (266b).**

Norðoya Sambandsfelag ásannar, at í etiskum spurningum hevur Sambandsflokkurin altíð havt ta greiðu linju, at tinglimir kunnu atkvøða eftir egnari sannføring, og hesa linjuna stuðlar Norðoya Sambandsfelag.

Men eftir stendir nú spurningurin:

Hvat meinar sambandsflokkurin við orðini í stevnisskránni – **»at flokkurin vil føra ein framfúsnan politikk á kristiligum mentanarstøði«**?

Tí hevur nevndin í Norðoya Sambandsfelag í skrivi til floksleiðsluna mælt til, at flokkurin fer at viðgera grein eitt í stevnisskránni, har flokkurin sigur seg vilja reka ein »framtaksfúsan politikk á kristiligum mentanarstøði«

# Larmur



DAN R. PETERSEN

Í mínum arbeiði umborð eri eg blivin varur við, at menn hoyra illi. Menn, sum eru farnir um hálvan aldur hoyra stak illa. Og summir eldri eru sum potturin.

Hetta kemst av larmi, ein-um konstantum ólíðiligum larmi. Serliga ringt er á fabrikkini. Óisolerað hydraulikrør hvína millum høvdini á dekkarum, so ikki hoyrist mannamál. Menn fáa ikki tosa saman, uttan teir venda andlit til andlit og standa tætt.

Larmurin úr maskingongini er eisini nógvur. Gangurin er tó mestur á trolara, tá ið trolið ferð afturav. Millum troldekk og arbeiðsdekk er bert ein 6 m m óisolerað stálpláta. Tá so trol, bobbensir, breitlar og ketur fara skramblandi aftureftir, er ein øgiligur gangur á fabrikkini, meira enn oyrað tolir.

Tað verður eitt krav frá einari nýggjari leiðslu í F.F., at skipaeftirlitið fer einkultar túrar til fiskiskap og fær staðfest, at hesin larmur er heilsuskaðiligur og eisini ólógligur.

Tá hetta er staðfest, kunnu reiðarar fáa eina freist, kanska 2 ár at fáa hesi sjálvsøgdu viðurskiftir í rættlag. Her manglar bara bjálving.

Arbeiðsumhvørvi verður raðfest høgt í einum fornýggjaðum F. F.

# Drúgvur og trúgvur floksarbeiðari



KARIN KJØLBRO

Karsten Hansen er farin úr Tjóðveldisflokkinum. Tað eru vit mong, sum harmast um. Hann hevur greitt grundað sína støðu, og hana virða vit. Eins og tað var ein samvitskuspurningur og trúarspurningur hjá mær at atkvøða *fyri* 266b í revsulógini í 1988, so er sami spurningur fyri hann ein forðing fyri framhaldandi limaskapi í Tjóveldisflokkinum vegna hansara trúgv og samvitsku.

Tað var í 1983, at vit bæði fóru úr arbeiði okkara til tess at arbeiða á floksblaðnum *14. September*. Stavnhaldið var at fáa skikk á. Hann sum fyritaksstjóri og eg sum blaðstjóri. Bæði fóru niður í løn og fingu ein arbeidsdag, ið ikki var í ætt við 40 tíma arbeiðsviku. Sigast má, at tað eyðnaðist. Í øllum førum fekk Karsten ikki bert skil á tað fíggjarliga. Flokkurin fekk eisini eini flokshús, ið so leingi hevði verið ein dreymur. Og tað var ikki minst honum fyri at takka.

Karsten er heilur, har hann er, har er onki himpr. Sum eygleiðari av løgtingsarbeiði sum heild í dag er hetta fólkaslag doyggjandi.

Í tí tilgongd, sum er farin fram í samband við broyting í revsilógini hevur Karsten í almenna rúminum eisini víst, at hann kann stýra sær sjálvum, sum er aðaltreytin fyri at stýra einum landi. Tað er meira enn sigast kann um fleiri av teimum, ið eru samsintur við honum í spurninginum um § 266 b.

Løgið sum aðrir flokkar fegnir vilja hava fatur á tjóðveldisfólkum, tá hugsað verður um atburðarlag og arbeiðsmentan í føroyskan politikki.

Jú eisini eg fekk tilboð um at stilla upp fyri aðrar flokkar, tá eg ikki stillaði upp longur. Men fyri tjóðveldisfólk er onki alternativ.

Góði Karsten, takk fyri gott samstarv í ein mansaldur. Gleðilig jól og Jesus fylgi tær.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

# Avrokning



DAN R. PETERSEN

Er ikki avroknað fyri ísfiskalast í seinasta lagi 14 dagar eftir søludag eigur manningin 1,5 % í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað, eftir at túrurin átti at verið avroknaður.

Eru langfaramenn ikki avroknaðir í seinasta lagi 30 dagar eftir søludag, eiga teir 1,5 % í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað...

Rætt skal vera rætt: Onkur hendinga reiðari avroknar til tíðina, men teir eru fáir. Tað er ikki óvanligt, at ísfiskamenn eiga 4-6 túrar niðurfyri, alt eftir hvørjum teir sigla hjá.

Summir langfaramenn bíða bæði tveir mánaðir og longur eftir avrokning, aftan á at teir eru heimkomnir. Tvs., at frá tí at menn fara avstað, til avrokning kemur, kunnu ganga fýra - fimm mánaðir.

Hesa longu tíð livir sjómansfamiljan av forskoti úr Lønjavningarstovuni.

Eingin hevur nakrantíð hoyrt um, at sjómenn hava fingið rentu fyri ov seina avrokning.

Hetta óskilið hevur tvær orsøkir:

1. Reiðarin hevur ikki virðing fyri sínum fólki, og
2. Formaðurin í F. F. hondhevjar ikki sín egna sáttmála.

Gud náði tann arbeiðsgevara á landi, ið ikki betalir sínum fólki til tíðina.

Menn, ið hava siglt undir íslendskum flaggi, siga mær, at har avroknar reiðarin tveir dagar eftir avmynstring við 90% og restina ein mánað seinni. Slíkt kann mann finna seg í.

Til stuttleika kann eg nevna, at einaferð fiskaði eg við donskum báti út frá Nexø á Bornholm.

Ein hálvan tíma eftir, at síðsti fiskakassin var landaður, fingu vit kekkin í hondina. Slíkt kann mann eisini finna seg í.

Nei, føroyskir reiðarar hava nógv at læra, tað er vist. Og her skal strammast upp.



**Illur???**

**Sig tína meining í Sosialinum**

